tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 57 mikudagur 22. mars 1995 69. árgangur Krónur 7.00



**INGEBORG VINTHER, løgtingskvinna:**

# Eg havi skjótt mist tolið við Óla Jacobsen

*»Uppskotið var ikki ætlað sum misálit á Óla Jacobsen, men hendir einki heilt skjótt, havi eg eisini mist tolið við honum,« sigur Ingeborg Vinther, løgtingskvinna fyri Verkamannafylkingina. »Hann er ikki øðrvísi enn hinir landsstýrismenninir, sum ikki lurta eftir vanliga tingmanninum.«* **Lesið á síðu 5**

**MARTIN PALDAM, búskaparfrøðingur:**

## Ørskapur við so nógvum kommunum

Lesið á síðu 11



## Filmurin um Barbaru útsettur

síða 7

## Fólkatingið skal viðgera dómarakanningina um tríggjar vikur

síða 8

## Leiðandi norsk oljufólk á fundi í Føroyum

Lesið á síðu 6

## Tólv bindiklubbar í Vági saman um veitslu

síða 3



Oljuráðleggingarnevndin á fundi í Skálanum í gjár. Mynd kalmar

*Skulu eisini hitta føroysku oljuráðleggingarnevndina:*

# Leiðandi norsk oljufólk fund í Føroyum

*Um sama mundið sum føroyska oljuráðleggingarnevndin heldur fund í Havn og m.a. skal kunna løgtingið um gongdina í oljumálinum hava topparnir í norskari oljuvinnu og -fyrisiting sín árliga fund á Hotel Føroyum. Teir báðir bólkarnir hittast í dag*

Einaferð um árið hittast topparnir – oddafólkini – í norsku oljuverðini at umrøða spurningar av felags áhuga, og tað eru spurningar, sum hava tilknýti til oljuvinnu á norska landgrunninum.

Í ár hava fyrireikararnir valt at halda hendа árliga fundin í Føroyum. Hann verður á Hotel Føroyum komandi dagarnar.

Fundurin hevur sum so einki við tær kanningar, sum verða gjørdar í føroyskum øki í sambandi við at leita eftir olju og gassi.

Norðmenninir verða 25 í tali, og talan er um fleiri av veruligu bossunum í norskari oljuvinnu og oljufyrisiting.

Her eru umboð fyri Norska Oljudirektoratið, fyri Norskja Olju og Orkudepartementið og fyri Statoil.

Ein av teimum kendastu persónunum, sum umboðar myndugleikarnar, er Fredrik Hagemann, sum er stjóri í Oljudirektoratinum og harvið ein av ovastu embætismonnunum innan oljuvinnu í Noregi.

Sami Hagemann var við á oljuráðstevnu í Havn í fjør, tá tosað varð framtíðar oljuvinnu við Føroyar. Hann hevur verið uppi í tilrættaleggingini av norskari oljuvinnu frá byrjan av og er ein av teimum mest royndu á økinum.

Frá Olju- og orkudepartementinum eru m.a. Ole Lindseth og Dag Omre.

Flestu av luttakarunum eru frá Statoil við Kyrre Nese og Tor Fjæran, stjórum á odda.

Við í ferðalagnum eru so eisini flestu av teimum leiðandi og mest royndu jarðfrøðingunum í Noregi í dag.

**Norðmenn og føroyingar hittast á fundi**

Norðmenn halda sín árliga fund samtíðis sum at øll tann føroyska oljuráðleggingarnevndin heldur sín vanliga fund. Sum so hava hesir fundirnir einki við hvør annan at gera, men nú teir eru samtíðis og so nógv fólk við tilknýti til oljuvinnu eru savnað í Havn verður so eisini ein fundur millum norsku oljufólkini og oljuráðleggingarnevndina. Hesin fundurin verður seinnapartin í dag.

Í gjár helt oljuráðleggingarnevndin fund í løgtinginum saman við øll tingmonnum. Endamálið við fundinum var at kunna tingmenn um gongdina í øllum oljumálinum higartil og at skifta orð um tann lógarkarm, sum í løtuni verður fyrireikaður av oljufyrisitingini og sum skal samtykkjast í løgtinginum um eitt ár ella so.

Tað verður annars nógv virksemi á oljuøkinum alla hesa vikuna. Mánadagin høvdu tær báðar undirnevndirnar undir oljuráðleggingarnevndini fund.

jan



Leiðarin á Oljufyrisitingini Martin Heinesen her saman við tveimum av teimum ungu og nýggju andlitunum í føroyska oljuhópi: Allan Skaalum, sum skal arbeiða við búskaparligum spurningum og Herálvur Joensen, sum tekur sær av løgfrøðini. Mynd kalmar



Fredrik Hagemann, stjóri í norska oljudirektoratinum, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum. Her er hann saman við Arna Olafson, leiðara í oljuráðleggingarnevndini á oljuráðstevnu í Havn. Mynd jan

**TVINGSILSSØLA**
**Hósdagin**
**tann 6. apríl 1995,**
**kl. 13.20**

verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn ognirnar, **matr. nr. 904 b og 903 e, Landavegur 36, 100 Tórshavn** seldar á tvingsilssølu (AS nr. 2/95).

Talan er um sethúsaogn, har kjallarahæddin hevur verið nýtt til vinnuendamál. Kjallarahæddin er 141 m² og stovuhæddin er 117 m². Bygningurin, sum bygdur er á báðum matr. nr., er í góðum standi.

Áheitan um tvingsilssøluna er latin inn av **Páll Nielsen, advokati, Hoyviksvegi 27, Tórshavn, (j. nr. 815/1994)**, sum kann geva nærri frágreiðing um ognirnar, og sum kann vísa tær fram.

Søluuppgerð kann fáast við at venda sær til nevnda advokat, og møguleiki er eisini á dómaraskrivstovuni at síggja nevndu uppgerð.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 17. mars 1995*
Henrik Engell Rhod
dfm.

KALT BORÐ
HVØRT KVØLD
uttan sunnukvøld
Borð kann bileggjast
HOTEL HAFNIA
Tlf. 11270
Hotellið í Miðbýnum

**Bussur ynskist**
15–20 persóna bussur ynskist lagaliga. Størri bussur kann hava áhuga.
Tlf. 74842 - e. arb. tíð.: 73842, 70150